VIÐMERKINGAR

# Førleikamenning og útbúgving eiga at verða yvirskriftirnar

**Jákup Danielsen**



Nú standa so sáttmálasamráðingar aftur fyri durum og nevndir í arbeiðarafeløgum og almennum fakfeløgum gera seg til reiðar at samráðast um prísin fyri arbeiðsmegina. Feløgini spyrja sínar limir um hvat tey halda eru røttini málini at taka upp til slíkar samráðingar og eru svarini sum oftast kend frammanundan, nevniliga hægri løn, styttri arbeiðstíð ella longri frítíð og eftirlønin.

Og einki ringt um tað.

Nevndirnar í feløgunum lata boðini fara spakuliga út hvat roknast kann við til samráðingar og arbeiðsgevarin svarar aftur sum vanligt at teir kunnu ikki lata fleiri lønarkrónur, versnandi kappingarføri og altjóðagering og at fyri teirra viðkomandi má lønin helst fara niður.

Also, ár undan ári koyrir sama pláta við sama lagnum á gamla plátuspælaranum.

Og hóast sagt verður, at vit ikki skulu kappast við kinverjar, tí teirra prísur fyri arbeiðsmegina er lægri og hartil so lágur at tað loysir seg at senda teimum fisk til tilvirkingar og fáa hann sendandi aftur, fyri síðani at flyta hann til keyparan, so siga vit, at vit ætlað at vera tey vit eru og at vit eru nakað meiri og øðrvísi enn teir.

Somuleiðis siga vit, at føroyingar alla sína tíð hevur livað av fiski bæði til matna og at selja og at vit hava víst við okkara dirvi við at finna fiskileiðir og at vit hava royndir, at vit hava ein góðan flota og annars hvussu dugnalig vit eru.

Vælferðarsamfelagið, við góðari hjálp frá dønum, hevur givið okkum góðar møguleikar fyri at senda fólk til m.a. Danmarkar og har kunnu fáa góða útbúgving. Og eftir eru so tey — lønarbeiðarnir — sum onga ella lítla útbúgving hava bæði á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum.

Í tí almenna hendir tað, at fólk við góðari útbúgving, men í byrjanini við lítlum og ongum arbeiðsroyndum, kunnu søkja størv í almennu umsitingini til eina munandi hægri løn enn vanligu skrivstovufólkini og tað tykjist ikki verða nakað mark fyri hvørji størv nú skulu hava hægri útbúgvingar fyri yvirhøvur at koma upp á tal fyri at fáa tey.

Í tí privata fækkað størvini av ófaklærdum og er hetta eisini tann lønarbólkur sum skjótast nærkast ALS skipanini, tá illa gongst í hond.

Og hóast tað er vælmeint, hvussu ber tað til, at hægri løn er ovast á raðfestingarlistanum. Er tað tí at breyðið er so dýrt, er tað tí at sethúsaprísir og rakstur av húsum annars er so beistaktiga dýrur ella eru krøvini til almenna luttøku í tænastuveitingini til okkara ov dýr?

Hevur tað nakað við tign og at verða í rætta selskapinum at gera, hvussu høg lønin og harvið skuldin til sethús, bil og bát skal verða? Og hví skulu tey sum sita niðri allan dagin fáa hægri løn enn tey sum veruliga brúka armar og bein og hóast tað fáa færri lønarkrónur?

Og soleiðis kundu vit hildið áfram at spurt, men orsøkin til hesa viðmerkingina er, at líka sum at vegurin til mansins hjarta, skal verða gjøgnum búkin, so má/kann vegurin til hægri løn verða gjøgnum økta førleikamenning og/ella útbúgving.

Mín spurningur er, um arbeiðarafeløg og onnur fakfeløg (heríroknað arbeiðsgevarnir) veruliga gera sær greitt hvussu týdningarmikið tað er at løntakarnir — arbeiðararar og t.d. skrivstovufólk — verða førleikament ella beinleiðis verða send til útbúgvingar.

Skrivað verður niður føgur orð um góðar ætlanir við førleikamenning, men aftanfyri orðini er eitt tómt hol og slettis einki samband við neyðuga fíggjarliga tilfeingið fyri at hetta yvirhøvur skal lata seg gera.

Bæði løntakarafeløg og arbeiðsgevarar hava ábyrgdina fyri at einki hendir, tí limirnir gjøgnum løntakarafeløgini hava sett upp raðfestingina, løn, frítíð og eftirløn og tá hettar er goldið, er lítið og einki at brúka til førleikamenningina ella útbúgvingina.

Kanska nakað fýrakantað sett upp, men veruleikin er hann, at fólk við góðari útbúgving ota seg meiri og meiri inn á økir, ið vanliga vóru roknaði at verða t.d. skrivstovuarbeiði og tí fer hesin bólkur so líðandi at minkað burtur í einki. Tað er so tað, men tað ringasta er, at hesi fólk sum teljast í hesum bólkinum hvørki eru til reiðar, gjørd til reiðar ella hava fíggjarligu møguleikarnar at fáa onnur líknandi størv ella størv sum tey kunnu røkja.

Sama er eisini við ófaklærdum. Teimum verður ikki givin møguleikar fyri at førleikamennað seg, enn minni fáa tey møguleika fyri útbúgving og tí er teirra rásarúm fyri at fáa aðrar avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum avmarkaðir.

Og serliga á privata arbeiðsmarknaðinum har tað snýr seg um ófaklærd arbeiðir t.d. í høvuðsvinnuni, spælir plátan sama lagið og arbeiðsgevarafeløg saman við arbeiðarafeløgum syngja lystiliga víðari sum um einki var hent og sama keglaríið um meira løn og ikki meira løn heldur áfram.

Nakað tað sama hendir fyri almennu arbeiðsgevarnar og almennu fakfeløgini. Ikki nóg ítøkiligar ætlanir um hvussu vit kunnu mennast sum starvsfólk og um hvussu vit kunnu betra um okkara møguleikar at fáa ábyrgdarfull størv, at kunna søkja onnur størv og á tann hátt betrað um inntøkuna.

Vit siga at vit ætlað ikki at lata okkum ræða av globaliseringini, men gera vit nakað fyri ikki at verða tikin við buksunum niðri?

Spádómarnir um at størv fara at verða niðurløgd í ávísum vinnum, fyri síðani at stinga seg upp aftur í øðrum vinnum, fara eftir mínari meining ikki til tey ófaklærdu ella til teirra sum lítla og onga útbúgving hava og hóast hesi starvsfólkini kunnu hava góðar arbeiðsroyndir í tí arbeiði sum møguliga verður lagt niður, so eru tey ikki til reiðar at taka móti nýggjum avbjóðingum ella nýggjum virkisøkjum.

Mín pástandur er, at við hesi menningar afturúrsigling sum í longri tíð hevur verið, skyldast í alt ov stóran mun, at sum einstaklingar, arbeiðsgevarafeløg og løntakarafeløg hugsað um okkara, meðan tað gongur meiri og meiri striltið við at síggja heildina. Vandi kann tí verða, at tá heildin eisini skal umfatað alla verðina, so fáa vit enn størri trupulleikar.

Til komandi samráðingar eiga løntakarafeløgini og ikki minst arbeiðsgevarnir at vísa hvat tey duga í verki, nevniliga at tað er førleikamenning og útbúgving sum eiga at verða yvirskriftirnar og veruliga vísa at hetta fundarvirksemi saman við semingsmonnum sum vit kennað frá undanfarnum árum er søga og at nú skal verða nýggj dagskrá verða, sum veruliga mennir limirnar og arbeiðsgevarnar. Landsins myndugleikar kunnu luttaka í hesum við einari strategiskari arbeiðsmarknaðarætlan.

# Bygnaðarbroytingar hjá Toll & Skatt

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Nakað hevur verið at hoyrt um broytingar í T&S. Fleiri fólk hava sovið illa um næturnar, tí hvat fer at henda? Mugu tey siga starvið upp, tí tað verður flutt so langt burtur, at møguleiki ikki er at fylgja við?

Nú er so eitt tíðindaskriv komið út, har rættiliga umfatandi broytingar verða gjørdar. Millum annað skal skattadeildin í Vágum, Runavík og Klaksvík niðurleggjast.

Fyri mongum tykist tað ikki sørt undarligt, at økir, ið stórt stríð hevur verið at byggja upp, nú við einum pennastroki skulu niðurleggjast og flytast.

Víðari tykist stór mótsøgn vera í, at ein bygningur hjá T&S í Klaksvík, ið er keyptur og útbygdur fyri tíggjutals milliónir skal niðurleggjast, tí norðoyingar skulu til annað stað at avgreiða síni T & S viðurskiftir, har ongin bygningur er til taks.

Tað tykist, sum um mangt ikki ruggar rætt her. Og at sparingarnar og og effektiviseringarnar koma at kosta nógv í bæði krónum og menniskjansligum ofrum.

Og eg ivist stórliga í, um nakar politiskur vilji er til at fremja fráboðaðu bygnaðarbroytingarnar.

Fyri mín part kann eg bert siga, at tað eg higartil havi hoyrt um hesar broytingar ikki fær meg at taka undir við teimum.

Fólk skulu eisini liva í Vágum, Klaksvík, Sandoy.

Tí ynski eg at hoyra rættiliga nógv meira um hesar broytingar, áðrenn eg, sum fólkavaldur í Vágum fari at siga ja til ætlanina.

# Áheitan á landsstýris mannin í fíggjarmálum

**Norðoya Sambandsfelag**

Norðoya Sambandsfelag kann als ikki góðtaka, at almenn arbeiðspláss verða flutt úr norðoyggjum inn á meginøkið, serliga ikki í hesum døgum tá fiski- og alivinnan hevur tað trupult.

Felagið ber ótta fyri at avgerðin hjá landsstýrismanninum um at steingja økisskrivstovuna hjá Toll og Skatt í Klaksvík kemur at lækka tænastustøðið til borgararnar í norðoyggjum.

Heitt verður tí á landsstýrismannin um at endurskoða ætlanina við atlitið til orðingarnar um økismenning í samgonguskjalinum.

# Aftur ein meirútreiðsla frá landsstýrinum?

**Súni í Hjøllum**
*Varaborgarstjóri í Nes kommunu*



Nýggja barnaverndarlógin er sum heild eitt gott tiltak. Mong við mær taka fult undir við, at málsræðið verður lagt út til kommunurnar. Men tað er alla átalu vert, um landsstýrið og løgtingið enn einaferð samtykkja eina lóg, sum kann fara at hava stórar meirútreiðslur fyri kommunurnar.

Seinnu árini er ferð eftir ferð komið fyri, at landsstýrið og løgtingið hava álagt kommununum meirútreiðslur, eisini eftir at fíggjarætlanirnar hjá kommununum eru samtyktar. Hesin óskikkur má steðga.

Nú er ætlanin at samtykkja eina lóg, sum lóggevarar eftir øllum at døma ikki vita, hvat hon fer at kosta fyri kommunurnar. Taparin verður hin einstaki borgarin úti í kommununum, tí kommunurnar verða tvingaðar at hækka skattaprosentið, um peningurin frá landskassanum.ikki fylgir við í fult mát. Hetta hevur eisini sosiala slagsíðu, tí tað eru tey lágløntu, sum koma at bera størsta sviðan. Við seinasta skattaléttanum í huga er hetta ein keðilig gongd, sum ikki boðar frá góðum fyri tey lágløntu.